# – Ein góð søk at stuðla

**Í samband við tiltakið hjá Amnesty International týsdagin, sang Lena Andersen nøkur løg á Torginum í SMS. Í hesum sambandi høvdu vit eitt lítið prát við hana**

AMNESTY
*Annika Isfeldt og Guðrun Jacobsen*




*- Tað er eitt super tiltak. Ein er ein rødd fyri tey, sum eru kúgað, sigur Lena Andersen, sum her syngur saman við manni sínum Niclasi Johannesen á guitara*

"Seinasta fløgan hjá mær hevur selt avbera væl í Føroyum, og í ár fari eg so at royna meg í Danmørk. Fyrsta stakfløgan hjá mær kemur út einaferð í vár, ella í summar. Og eg vóni, at tað fer at ganga væl", sigur Lena og smílist.

Í løtuni býr Lena í Kanada, og tað dámar henni væl.

"Pápi mín er uppvaksin í Kanada, og tí havi eg altíð følt meg væl har. Har er ein heilt onnur mentan, eitt heilt annað mál, og eg haldi, at fólkini eru meira opin enn í Føroyum. Men um tú lærir ein føroying at kenna, verður hann sjálvsagt meira opin."

Lena fortelur um framtíðarætlanir hennara:

"Tað næsta verður, at eg fari til Kanada at arbeiða, og tá ið fyrsta stakfløgan hjá mær kemur út í Danmark, ætli eg mær til Danmarkar at marknaðarføra hana."

### Amnesty og "Amy"

Lena var í SMS fyri at stuðla tiltakinum hjá Amnesty International.

"Eg haldi, at tiltakið móti harðskapi móti kvinnum er ein góð søk at stuðla. Tað er eitt super tiltak. Man er ein rødd fyri tey sum eru kúgað. Og eg haldi, eg geri mítt besta við at vera góð við míni medmenniskju".

Spurd um sangirnir, hon syngur her í dag, hava nakað við evnið at gera svarar Lena:

"Ja, nøkur løg passa til tiltakið. Serliga nýggi sangurin "Amy".

Hann snýr seg um eina gentu, sum ikki hevur tað gott. Hon torir illa at liva, og hon er í eini bíðistøðu," endar Lena.

# Porkeris býráð í nýggj høli



*Fyrsti fundur var í nýggju húsunum týsdagin, Porkeris býráð; Sigmundur Olsen, Gunnbjørn Petersen, varamaður fyri Hans Eli Bech, Eli Frederiksen, borgarstjóri, Lars Djurhuus, skrivari, Anna Djurhuus, varaborgarstjóri og Mikkjal Sørensen*
*(Mynd: D.Olsen)*



**Býráðið í Porkeri hevur keypt hús og fær nú munandi betri umstøður**

HØLISVIÐURSKIFTI
*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*

Porkeris Býráð er flutt í nýggj høli og hevur nú munnandi betri viðurskifti at virka í og nú er vítt til veggja, í mun til undanfarin høli.

Talan er um hús mitt í bygdini. Húsini eru upprunaliga bygd sum sethús í fimmtiárunum. Tey hava m.a. verið lærarаíbúð og eisini hava læknaviðtaluhøli verið í húsunum. Kommunan hevði eisini part av húsunum eitt skifti, frá 1975 til 78.

Í 1974 og til fyrst í nítiárunum átti Føroya Banki húsini og húsaðist í teimum. Porkeris Býráð hevur nú keypt húsini frá einum felag hjá Hera Hjelm. Talan er tó í fyrstu syftu um leigu av húsunum í tvey ár, men leigan gongur inn í keypið.

Skrivstovuútgerð og annað innbúgv er við í keypinum. Húsini eru í trimum hæddum og fáa kommunalu politikararnir í Porkeri við hesum rúmari ræsur at virka í.

## Televarpið fer nú at senda NRK 1

**Televarpið fer frá 1. apríl 2005 at senda norsku public service rásina NRK 1. Rásin verður at finna í øllum grundpakkunum hjá Televarpinum**

SJÓNVARP
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

– Hetta er enn eitt stig at tryggja føroyingum dygdargott norðurlendskt sjónvarp og samstundis menna norðurlendska public service-rásúrvalið hjá Televarpinum, sigur Laila Hentze, stjóri í Televarpinum. Saman við DR-rásunum kann Televarpið nú sum tann einasti veita haldarum sínum tær bestu og mest viðkomandi norðurlendsku public service-rásirnar, sigur hon.

Aðrar broytingar verða eisini framdar í Televarpinum 1. apríl. Tónleikarásin VH1 verður tikin úr rásúrvalinum, og Rás 1 og God Channel fara at skiftast um at senda á somu rás.

Broytingarnar hava ongar príshækkingar við sær.

– Televarpið arbeiðir framvegis við at víðka um sendinetið. Í mars og í apríl fara íbúgvarnir í Hvalvík, Streymnesi og Kvívík at síggja Televarpið. Við hesari útbyggingini røkkur Televarpið uml. 75% av føroysku húsarhaldunum. Kanningar um víðari útbyggingar verða somuleiðis gjørdar í ár, sigur Laila Hentze.



*At senda NRK 1 er enn eitt stig at menna norðurlendska public-service-rásuúrvalið hjá Televarpinum, sigur Laila Hentze, stjóri í Televarpinum*